# Vilja veita betri tænastu


Vágabussurin fer væntandi trý korter seinni úr Vágum á morgni, tá undirsjóvartunnilin er upplatin

Mynd: Edvard Joensen

**Á Strandfaraskipum Landsins vóna tey at kunna veita sum ferðast vestur í Vágar væl betri tænastu, nú farleiðin styttist munandi við undirsjóvartunlinum**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Trý korter seinni úr Vágum fyrsta túr á morgni, og beinleiðis túr úr Havn vestur í Vágar seinnapart er nakað av tí, Bygdaleiðir fara at bjóða vágafólki, tá undirsjóvartunnilin letur upp.

Poul Jákup Thomsen, fólkaflutnignsleiðari á Strandfaraskipum Landsins, sigur, at har vóna tey at kunna hækka tænastustøðið nakað væl, nú tunnilin kemur.

Neyðugt verður nú ikki hjá vágafólki at skifta buss á veg heimaftur eftir arbeiðstíð, tí bussurin, sum fer úr Havn seinnapartin, koyrir allan veg vestur. Sum er skal fyrst skiftast í Vestmanna og farast umborð á ferjuna. Síðan aftur í buss á Oyrargjógv.

Tó verður tað soleiðis, sigur fólkaflutningsleiðarin, at onkrar túrar mitt á degi, tá vanliga lítið fólk er við bussinum, fer vágabussurin at steðga við tunnilsmunnan á Signabø, haðani fólk so kunu fara víðari við eysturoyar- ella vestmannabussinum.

Skulu fólk so hinvegin, verður tað sama galdandi, at skift verður á Signabø.

Eisini hinvegin verður beinleiðis samband bæði morgun og seinnapart. Bussur fer úr Havn á morgni vestur í Vágar, og øvugt aftur seinnapartin.

Eftir galdandi ferðaætlan verður koyrt fyrsta túr á morgni úr Sørvági klokkan 06.05. Hesin túrurin verður niðurlagdur, og farið verður so ístaðin fysta túr, tá annar túrur nú verður koyrdur klokkan 06.45. Hesin fer tá beinleiðis til Havnar.

Hendan klokkutíðin er tó ikki nøkur endalig tíð kortini, sigur Poul Jákup Thomsen. Tí vísir tað seg, tá ein tíð er fráliðin, at bíðitíðin eftir eitt nú býbussunum í Havn verður ov drúgv, verður fráferðin úr Vágum flutt, so upp aftur seinni verður koyrt vestaneftir.

Ein óvissa er kortini framvegis við hesi rutuni, og tað er prísurin. Hóast nú nærkast rættiliga skjótt upplatingini, er einki frætt um prís enn, sigur Poul Jákup Thomsen. Og tað ørkymlar eitt sindur, heldur hann.

Í dag gjalda fólk, sum ferðast um Vestmannsund sjálvandi fyri ferjuna, og kostar eitt nú eitt mánaðarkort alt í alt 1.050,- krónur fyri bæði buss og ferju.

Hvussu tað verður, tá tunnilin letur up, veit Poul Jákup Thomsen ikki, men vónar tó, at tað í hvussu er ikki nýtist at verða dýrari enn í dag.

– Kanska fer tunnilsgjaldið at viga upp í móti tí, vit rinda fyri ferjuna í dag, sigur hann. Men eg vóni sanniliga, at tað kann gerast bíligari.

Enn er tó bert talan um uppskot, sum í løtuni er til hoyringar hjá avvarðandi pørtum so sum teimum, ið skulu røkja rutuna, sigur Poul Jákup Thomsen.


Vetrarferðatilboð 14.09.2002 - 10.05.2003

The North Atlantic Link



galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

Íroknað prísin er:
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.

Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum. Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.

Ebeltoft (myndin) · Blokhus · Hirtshals

4.995,-
gisting 7 nætur

Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.




Shetland Cruise

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrönu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.

Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

Pakkaferð við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |




Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi
2 vaksin og 2 børn við bili

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |

team85

Pakkaferð við gisting á hotelli
2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm
Íroknað prísin er:
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari v. WC/bað. Uppihald: 7 nætur á Hotel Hanstholm í dupultkamari við WC/bað. Á hotellinum er morgunmatur íroknaður.
fyri hvønn
3.290,-
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 3. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili
Tórshavn - Hanstholm og aftur
í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.990,-

2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 3. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili
Tórshavn - Lerwick og aftur
í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.200,-

e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00








3 arin 35 35 33

11. novembur kemur 4. fløgan hjá Westlife út kring allan knøttin! - sjálvandi eisini í 3'aranum.
Á fløguni eru savnað øll teirra hitt higartil - umframt 4 heilt nýggj løg og eitt jólalag.

e-mail: cd@3-arin.com